Landssjúkrahúsið

Útboð

# Oljuveiting til Landssjúkrahúsið

J.C. Svabosgøta 41-49 • 100 Tórshavn • Tel. (298) 304500 • fax 314253 • www.ls.fo • ls@ls.fo

Sum liður í støðugt at reka Landssjúkrahúsið fíggjarliga best møguligt verður oljuveiting til Landssjúkrahúsið boðin út í eitt 1-ára tíðarskeið við optión upp á 2 ferðir 1 ár.

Útboðið er í tveimum pørtum:

1. Oljuveiting
2. Diesel veiting til bilar hjá Landssjúkrahúsinum

Veitarar kunnu bjóða upp á annan ella báðar bólkarnar. Sí niðanfyri undir tilboð og tillutan. Freistin at lata inn tilboð er hin 16. desember 2013 kl 11:00.

**Spurningar**
Spurningar til útboðstilfarið skulu sendast skrivliga til Landssjúkrahúsið, Tænastudepilin, att. Jóan Símun Saltá, teldupostur lsjoasa@ls.fo innan 4. desember 2013. Spurningar og svar verða almannakunngjørd á keypsportalinum hin 5. desember 2013.

## 1. Oljuveiting

Nøgdirnar í tilfarinum eru grundaðar á veitingar í 2012, og prísir og upphæddir eru uttan mvg. Vit skulu gera vart við, at broytingar í nøgd kunnu koma fyri vegna graddagatalið og orsakað av at Landssjúkrahúsið støðugt kannar alternativar orkukeldur. Møguleiki er eisini fyri, at sethús, sum Landssjúkrahúsið eigur í Tórshavn, verða seld í avtalutíðarskeiðnum.

### 1.1 Veiting til Landssjúkrahúsið
Tveir gassoljutangar eru á ognini hjá Landssjúkrahúsinum í J.C.Svabosgøtu.
Støddin er 45 $m^3$ hvør.

Nýtslan í 2012 var góðar 1 mió.litrar.

Mannagongdin er, at nýtslan fer fyrst úr tí eina tanganum til umleið 5 $m^3$ eru eftir, tá skift verður til hin tangan. Oljuveitarin kannar eftir, nær skiftið millum tangarnar fer fram og fyllir "tóma" tangan beinanvegin.

Oljuveitarin avger, nær á degnum, áfylling fer fram. Treytin er, at áfylling fer fram í arbeiðstíðini hjá Maskinverkstaðnum. T.v.s. mánadag-fríggjadag millum kl. 07 og 16:00. Landssjúkrahúsið góðtekur ikki, at tað eru restir í tangabilinum, ið verða fyltar í tangarnar.

Í miðal er talan um 3 áfyllingar um mánaðin.

### 1.2 Veiting til sethús í Tórshavn
Landssjúkrahúsið hevur tvey sethús í Tórshavn, sum olja skal veitast til. Her fer áfylling fram sum við vanligum sethúsum. Eisini verður veitari at rokna oljufýrtænastu og veiting í prísin.

Nýtslan/áfylling í 2012 var:

| Bústaður | Litrar |
|---|---|
| Bóndabrekka 13 | 4.546 |
| Háskúlavegur 5 | 2.870 |
| **Í alt** | **7.416** |

**2. Diesel til bilar hjá Landssjúkrahúsinum**
Diesel nýtslan í bilunum er heldur ójøvn og tí trupul at gera upp sum grundarlag. Tó kunnu vit upplýsa, at samlaða diesel-keypið í 2012 var upp á góðar 325 tkr.

Mannagongdin er, at bilførari hevur eitt áfyllingarkort við persónligari pin-kotu. Tá avroknað verður fyri diesel áfylling, skal rokning upplýsa kortnr. og nummarplátuna á akfarinum. Roknast kann við, at talan verður um umleið 30 áfyllingarkort til bilførarar.

Áfylling skal kunna fara fram á servicestøðunum kring alt landið.

**Tilboð og tillutan**
Útgangsstøðið í tillutanini er hægsti avsláttur. Fyritreytin er, at dagsprísurin ella listaprísurin á føroyska oljuveitingarmarknaðinum er eins hjá útbjóðarunum. Við atliti til sveigginí í dagsprísinum er fortreytin, at sveiggini í dagsprísinum fylgja altjóða sveiggjum í oljuprísum, t.d. Brent - Europe (DCOILBRENTEU).

Tillutað verður eftir hesum bólkum:

Avsláttur í kr./ltr. í mun til dagsprís, Landssjúkrahúsið, ___________kr./ltr.

Avsláttur í kr./ltr. í mun til dagsprís, sethús, ___________kr./ltr.

Avsláttur diesel, ___________kr./ltr.

Um serligar treytir, t.d. gjaldstreytir, eru knýttar at avsláttrinum, verður veitari greitt at tilskila tær í tilboðnum.

Tillutað verður fyri hvønn bólk sær, har hægsti avsláttur verður veittur. Við hesi framferð tilskilar Landssjúkrahúsið sær soleiðis rætt til at taka inn ein ella fleiri veitarar.

Somuleiðis tilskilar Landssjúkrahúsið sær rætt til at vraka tilboðini, um tey ikki eru nøktandi. Áðrenn vraking ella tilluting fer fram, verður eitt møguligt útgreinandi ella eitt samráðingarumfar fyriskipað

Av tí at talan er um alment útboð sambært rundskrivi frá FMR, sí http://gjaldstovan.gov.fo/Keypsportal/Skjol/Rundskriv%20um%20keyp%20av%20v%c3%b8rum%20og%20t%c3%a6nastum.pdf, verður veitari greitt at tilskila í tilboðnum, um tilboðið verður latið í trúnaði við atliti til kappingarstøðuna á oljuveitingarmarknaðinum og við atliti til, at prísurin er alt avgerandi fyri tillutan.

**Innlating**
Freistin at lata tilboð inn er hin 16.desember 2013 kl 11:00. Tilboðini skulu latast til

Landssjúkrahúsið
Tænastudepilin, att. Jóan Símun Saltá
J.C.Svabosgøta
100 Tórshavn
t-postur lsjoasa@ls.fo

Tilboðini kunnu latast í pappírsformi ella í teldutøkum formi. Tilboðini verða latin upp 16. desember kl 11:00 í fundarhølinum í fyrisitingini á Landssjúkrahúsinum.